# Barsilsskipanin einfaldari og minni arbeiðskrevjandi

**Eftir, at uppskotið um nýggja barsilsskipan varð lagt fyri tingið, hava Vinnumálastýrið og Arbeiðsloysistryggingin, sum skal umsita skipanina, funnið fram til ein einfaldari og minni arbeiðskrevjandi innkrevjingarskipan**

*Turið Kjølbro*

Orðini hjá Heina O. Heinesen, formanni í løgtingsins vinnunevnd, í leygardagsblaðnum, um at uppskotið um nýggja barsilsskipan er illa úr hondum greitt av Vinnumálastýrinum, undra ikki sørt landsstýrismannin í vinnumálum, Bjarna Djurholm. Heini O. Heinesen vildi vera við, at nógvar smærri og størri broytingar eru kravdar síðani uppskotið kom í vinnunevndina og at landsstýrismaðurin, sum sjálvur legði uppskotið fram, eigur meginpartin. Eisini dagfestingin, tá skipanin skal koma í gildi, er flutt eftir ynski frá landsstýrismannininum.



*– Tað er ikki rætt, tá sagt verður, at uppskotið ikki er nóg væl úr hondum greitt. Vit skulu hava í huga, at her verður velt burtur úr nýggjum, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum*

– Tað er ikki rætt, tá sagt verður, at uppskotið ikki er nóg væl úr hondum greitt. Vit skulu eisini hava í huga, at her verður velt burtur úr nýggjum. Broytingarnar, eg havi skotið upp, eru úrslit av tí arbeiði, sum verður gjørt í vinnumálastýrinum alla tíðina og eru bert av tekniskum slag. Vit hava ikki skotið nakra broyting upp í sjálvum innihaldinum. Eftir, at vit løgdu uppskotið fram eru vit komin eftir í samráð við Arbeiðsloysistryggingina, sum skal umsita skipanina, at vit kunnu gera innkrevjingarskipanina einfaldari og minni arbeiðskrevjandi. Tí hava vit skotið upp nakrar tekniskar broytingar, sigur Bjarni Djurholm.

Nógvar dagfestingar hava verið nevndar, tá barsilsskipanin skal koma í gildi, síðani uppskotið av fyrstan tíð varð nevnt. Í uppskotinum, sum varð lagt fyri tingið beint fyri jól síðsta ár, var 1. apríl nevnt.

– Vit mettu tað verða skilagott at fáa skipanina at galda frá tí degi, tí tá lækkar inngjaldið til ALS og samsvarandi inngjald skal í barsilsskipanina. Men telduteknisku fyrireikingarnar taka so mikið langa tíð, at vit ikki kunnu verða liðug til 1. apríl. Eykajáttan skal eisini til keyp av teldum. Tí hava vit valt at seta dagin, tá skipanin skal koma í gildi til 1. juni. Tá virkar skipanin, sum hon eigur.

## Avleiddar broytingar

Tað eru nærum tríggir mánaðir síðani uppskotið um nýggja barsilsskipan galdandi fyri allar kvinnur á arbeiðsmarknaðinum varð lagt fyri tingið. Fyrst í januar var fyrsta viðgerð av uppskotinum á tingi og málið varð beint í vinnunevndina, har tað hevur verið síðani. Vanliga brúka nevndirnar ein mánað til viðgerð.

– Av tí at uppskotið framvegis ikki er komið aftur úr vinnunevndini, vita tey, sum skulu gera skipanina, ikki, hvat hon førir við sær teldutekniskt. Ei heldur Arbeiðsloysisskipanin, sum skal umsita skipanina, sigur Bjarni Djurholm.

Vinnunevndin hevur eisini sjálv broytingar til upprunauppskotið, broytingar, sum sambært landsstýrismannin ikki gera uppskotið lættari at umsita.

Fyri at nýggja barsilsskipanin skal virka, skulu broytingar gerast í fleiri øðrum lógum, eitt nú í dagpeningalógini, sum landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum umsitur. Eisini skal p-talið brúkast og tí skulu broytingar gerast í skrásetingarlógini. Hesa umsitur landsstýrismaðurin í lógarmálum og hann hevur akkurát lagt uppskot um broytingar fyri tingið.

# Ein rás má helst flytast

**Radioeftirlitið arbeiðir við eini endaligari loysn á útvarpstrupulleikunum í Klaksvík**

ÚTVARP
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Klaksvíkingar hava framvegis útvarpstrupulleikar at stríðast við, men Radioeftirlitið vónar at loysa hesar trupulleikar innan stutta tíð.

Síðani Lindin kom til Klaksvíkar hevur ólag verið á sendinetinum, og hóast sendarin hjá Lindini herfyri varð skrúvaður niður, eru framvegis trupulleikar.

Í døgunum eftir at Lindin fór at senda í Klaksvík, fekk Radioeftirlitið nógvar klagur úr Klaksvík, og hesar klagur koma framhaldandi.

– Tað eru serliga tey gomlu útvarpstólini, sum hava trupulleikar við at skilja millum rásirnar, men vit arbeiða við eini loysn, sum vónandi loysir hesar trupulleikar endaliga, sigur Don Petersen á Fjarskiftiseftirlitinum.



*Radioeftirlitið roynir at finna eina loysn á útvarpstrupulleikunum í Klaksvík, sum kann fáa sendiviðurskiftini í rættlag aftur*

## Ein rás flytast

Don Petersen vil ikki útgreina, hvat hendan loysnin inniber, men hann váttar, at tað kann koma upp á tal, at flyta eina rás á FM-bandinum.

Orsøkin til hetta er, at frekvensirnir, sum rásirnar í Klaksvík senda á, passa ikki saman, og tað er helst orsøk til trupulleikarnar. Harafturat skal sendarin hjá Rás 2 eisini skrúvast nakað niður.

– Enn er eingin endalig avgerð tikin um nakað. Vit fundast við partarnar, men ætlanin er, at vit skulu hava eina loysn innan stutta tíð, sigur Don Petersen.

## Passa ikki saman

Útvarp Føroya sendir á 94,3 MHz, Rás 2 á 107 og Lindin á 105, og sambært teimum, sum hava skil á hesum, eru tað frekvensirnir hjá Útvarpi Føroya og Lindini, sum ikki passa saman.

Tí má onnur av hesum rásunum helst hava nýggjan frekvens á Brúnaskarði.

Tað er ilt at ímynda sær, at gamla Útvarpið skal flytast, og tí verður tað eftir øllum at døma Lindin, sum má hava nýggjan frekvens.



# Kunnu velja, hvussu tey vilja hava frítíðarlønina útgoldnað

**– Arbeiðsfólk, sum eru undir fastlønarsáttmála, kunnu velja, um tey vilja hava feriu við løn, ella um tey vilja hava vanliga feriuløn av allari lønini**

FERIULØN
*Áki Bertholdsen*



Tey arbeiðsfólk, sum eru løntir eftir einum fastlønarsátmála, kunnu sjálvi velja, hvussu tey vilja hava frítíðarlønina útgoldnað.

Á aðalfundinum á Føroya Arbeiðarafelag seinasta vikuskiftið kom fram, at nógv arbeiðsfólk, sum høvdu fastlønarsáttmála høvdu trupulleikar av frítíðarlønini.

– Tað er púra greitt eftir lógini, at øll tey, sum eru lønt eftir fastlønarsáttmálanum, kunnu frítt velja, antin tey vilja hava feriu við løn, ella um tey vilja hava 12% í frítíðarløn av allari lønini.

Tey, sum fáa feriu við løn, fáa bara ta føstu lønina í feriutíðini, umframt 1,5% afturat í frítíðaríSkoyti. Tey missa sosatt frítíðarløn av møguligari yvirtíð.

Teir arbeiðsgevarar, sum hava fólk lønt eftir fastlønarsáttmála vilja treyðugt geva fólki 12% í frítíðarløn.Teir vilja heldur lata arbeiðsfólkið hava feriu við løn umframt frítíðaríSkoytið upp á 1,5%.

– Serliga har tað er nógv yvirtíð, er nógvur peningur at spara hjá arbeiðsgevaranum, um fólkið fer í feriu við løn og so fær 1,5% afturat.

– Skulu tey hinvegin brúka hin møguleikan, og fáa 12% í frítíðarløn, er tað av allari lønini og tað kann skjótt verða nógv dýrari fyri arbeiðsgevaran.

Dømi varð nevnt um ein, sum fær 200.000 krónur í løn um árið, ella 16.666 krónur um mánaðin, eftir fastlønarsáttmálanum. Men afturat tí hevur hann 100.000 krónur um árið í yvirtíð.

Arbeiðsgevarin vil bara lata hann fáa feriu við løn. Sostatt fær hann bara 16.666 krónur í feriuløn, umframt 1,5% í frítíðariskoytið, ella slakar 20.000 krónur tilsamans.

Men hevði hann valt hina skipanina og fingið 12% av allari lønini, hevði hann fingið 36.000 krónur í feriuløn

Á Aðalfundinum førdu fleiri arbeiðsfólk fram, at arbeiðsgevarin vildi ikki lata tey sleppa at velja, hvussu tey skuldu fáa feriulønina.

– Ongin arbeiðsgevari kann tvinga nakran, sum er løntur eftir føstum sáttmála, til at fara í feriu við løn, umframt 1,5% í frítíðaríSkoyti.

– Arbeiðarin hevur fullan rætt at nokta og at krevja 12% í frítíðarløn av allari lønini ístaðin. Hetta stendur heilt greitt í løgtingslógini um frítíðarløn.

– Tað er bara at boða arbeiðsgevaranum frá fyri 1. apríl, tá ið feriuárið byrjar, hvussu tey vilja hava frítíðarlønina útgoldnað.

Men mælt var til, at alt arbeiðsfólkið á hvørjum arbeiðsplássi sær, seta kravið fram í felag fyri ikki at leggja trýst á hvønn einstakan arbeiðara.






Heimurin broytist hvønn einasta dag. Tí mást tú gera teg til reiðar at fylgja við.
Handilsskúlin hevur alla ta nýggjastu kunningartøknina og brynjar teg til framtíðina. Uttan mun til um tú eftir Handilsskúlan velur eina hægri útbúgving sum t.d. løgfrøði ella búskaparfrøði ella fert beinleiðis út í vinnulívið. Uttan mun til um tú velur FHS ella Hægri Handilsskúla. Handilsskúlin gevur tær **bæði** møguleika fyri framhaldslestri **og** vinnuførleika.

Ring til okkara ella støkk inn á gólvið, um tú vilt vita meira um Handilsskúlan.
Seinasta freist at tekna seg til Handilsskúlan er 15. mars.

**Hví taka annað, tá tú kanst fáa bæði?**

**FØROYA HANDILSSKÚLI**
Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177, 110 Tórshavn, Tel 31 71 77
Kambsdalur, 530 Fuglafjørður, Tel 44 49 00

www • team 85 • fo